sólorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI



# Vælkomin útí

Her er ein einastandandi møguleiki at sleppa beinleiðis suður í sólina fyri antin at taka lut í einum ella fleiri av okkara aktivitetum – ella fyri bara at taka tær av løttum.

Kom við flogfari okkara til Alicante og við bussum til hotel okkara í Albir ella Benidorm. Vitjanin er vælegnað til barnafamiljur eins væl og til einstaklingar, pør ella vinir, sum ynskja at sóla sær og hava tað hugnaligt.

Benidorm er ein av størstu feriudeplum í Spania. Sandstrendurnar eru fantastiskar og millum tær allarbestu í øllum landinum. Býurin er bert ein góðan hálvan tíma frá flogvøllinum.

Albir er ein friðarligari, men hugnaligur feriubýur bert 10 minuttir úr Benidorm og 45 minuttir frá flogvøllinum.

<u>Við í prísinum er:</u>

• beinleiðis flogferð t/r • bussur millum flogvøllin og hotellið t/r,
• gisting í 7 nætur við morgundrekka *)
• føroysk ráðgeving og hjálp á staðnum.

*)Til ber at keypa ½ ella fulla pensjón ella 'all-inclusive' afturat.

Harafturat ber til at melda seg til aktivitetir og útferðir fyri lagaligar prísir.

solorka@solorka.com • tlf. 221090
www.solorka.fo

## Albir

Familjur og vaksin



### A Albir Garden Resort & Aquapark

Hetta er heimavøllurin hjá Sólorku og staðið, har tær gitnu vár- og heystsetunar verða hildnar. Kømrini eru í lágum bygningum inni í tí stóra vakra havanum við svimjihyljum og øllum, sum hartil hoyrir. Sum nakað heilt serligt hevur Albir Garden sítt egna vatnland, hagar bert gestirnar á hotellinum hava atgongd.
(www.albirgardenresort.com)





Dømi

**Prísir fyri 7 dg.**

**Vaksin úr kr. 7.935,-**

**fyri hvønn, um tvey gista saman.**
**Eykakostnaður fyri eina-/serkamar**

**Bið okkum um tilboð til einstaklingar, pør, ella familjur**

## Benidorm

Bert vaksin



### B Hotel Agua Azul ****

Hetta hotellið er bert 400 metrar frá teirri frálíku Levante-sandstrondini og samstundis nær við miðdepilin í Benidorm. Tað hevur ein stóran svimjihyl og sólterassu í vakra garðinum. Her ber til at uppliva lívliga dámin á strondini og í best umtókta býarpartinum í Benidorm.
(www.hotelaguazul.com)





Dømi

**Prísir fyri 7 dg.**

**Vaksin úr kr. 8.985,-**

**fyri hvønn, um tvey gista saman.**
**Eykakostnaður fyri eina-/serkamar**

**Bið okkum um tilboð til einstaklingar, pør, ella bólkar**